# HEIMSINS BESTU TÍÐINDI

Heimsins Bestu Tíðindi er ein sjálvstøðugur miðil, sum komandi vikurnar fer at geva út stuttar greinir í Dimmu. Vit leggja dent á tíðindi, ið lýsa burðardygga menning og viðurskifti, ið ikki fáa nógv rásarúm í stóra miðlaheiminum. Heimurin er ikki einans fullur av trupulleikum, men rúmar eisini framgongd og loysnum. Vit á Heimsins Bestu Tíðindum halda, at tað er týdningarmikið eisini at varpa ljós á hesi tíðindi. Fleiri tíðindi kunnu lesast á leinkjuni www.verdensbedstenyheder.dk. Harafturat eru vit at finna á sosialu miðlunum.



Ein pakistansk kvinna og hennara rickshaw, sum bert er fyri kvinnur
Mynd: Plan International

# Kvinnuligir hýruvognsførarar basa fátækradømi í Pakistan

**Pakistanskar kvinnur, ið áður biddaðu pening á gøtuni, breyðføða nú bæði sær sjálvum og familjuni sum hýruvognsførarar**

Lobna Touhou og Lív Reynheim

Pakistan er millum vandamiklastu lond í heiminum at búleikast í hjá kvinnum. Í fjør gjørdi felagið World Economic Forum eina heimsfevnandi kanning av javnstøðu millum kyn í 145 londum, og Pakistan varð næstniðast á listanum. Kynsligur ágangur er sera vanligur í landinum, og kynslig eyðmýking er gerandisdagur hjá mongum kvinnum. Tískil er óvanligt, at kvinnur hætta sær út uttan ein mannligan fylgisvein.

Sambært innlendismálaráðnum í Stórabretlandi er bert fjórða hvør kvinna í aldrinum 15 til 64 ár á tí pakistanska arbeiðsmarknaðinum. Flestar teirra starvast innan landbúnað ella fiskivinnu. Pakistansku kvinnurnar hava lítlar møguleikar at vinna sær pening, og eru tí ofta fíggjarliga tengdar at einum manni. Men nýliga varð ein nýggj hurð latin upp í landspartinum Punjab – ein hýruvognstænasta veitir kvinnum kjansin at vinna sær pening á ein heldur øðrvísi hátt. Tænastan lænir út pening til eitt koyrikort, setur síðani kvinnuna sum hýruvognsførara, og bilur hennara er bert ætlaður kvinnuligum kundum.

Gauhar Iqbal var við at stovna tænastuna. Hon sigur frá, at nýggja tænastan brýtur niður siðbundnar hugsanarháttir um kvinnuna.“Í nógv ár hava kvinnur við koyrikorti verið eitt tabuevni í konservativu umráðunum í Pakistan, og sera fáar hava koyrikort. Men í seinastuni hava vit sæð fleiri stoltar familjulimir hjá kvinnum, ið koyra hýruvogn,” fortelur Iqbal.

## Gevur styrki

Bali Rani er millum teirra, ið hevur fingið starv hjá nýggju hýruvognstænastuni. Hon var von at bidda á gøtuni fyri at vinna sær sjálvari og børnunum pening til matna. Í dag koyrir hon í einum av ljósareyðu Rickshaw-hýruvognunum fyri kvinnur. Bali Rani greiðir soleiðis frá um nýggja starvið:“Arbeiðið merkir, at eg kann liva eitt virðiligt lív. Nú kann eg taka mær av mínum børnum og geva teimum eina útbúgving, júst so sum eg altíð havi droymt um.”

Mangt bendir á, at nýggja tænastan viðvíkur meiri enn bert einum arbeiði. Tá hýruvognsførarin Najm Un Nisaá fekk lyklarnar til sín Rickshaw, gjørdist hon sera errin. Hon kennir seg sum eina fyrimynd fyri genturnar í heimstaðnum, og henni dámar væl at koyra runt í býnum, tí hon sær seg hava ein leiklut í eini samfelagsbroyting. Nisaá leggur dent á týdningin, ið tænastan hevur fyri framtíðarmøguleikarnar hjá kvinnum – alt fleiri vága sær í skúla og til arbeiðis vegna hýruvognstænastuna, tí hon gevur teimum størri trygleika. Javnrættindi millum kynini hava framvegis langan veg á mál í Pakistan, men tænastan er eitt lítið fet á leiðini. Hon er nógv umhildin og vindur í løtuni uppá seg.










